Nr.

Løgtingslóg

um

broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin)
(Fylgibroyting orsakað av broytingum í almannalóggávuni o.a.)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 150 frá 27. oktober 2020, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 29, nr. 13 verður litra c orðað soleiðis: "c) Veitingar eftir §§ 15-19, § 24 og §§ 26-30 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur."

2. Í § 29, nr. 29 verður aftaná "heilsukanningar" sett: ", umframt gjald til vistarhald og klæði til barnið, sbrt. § 1, stk. 2, og lummapeningur til barnið, sbrt. § 1, stk. 3 í kunngerð um samsýning til fosturforeldur".

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virknað fyri útgjalding av veitingum frá og við januar 2020.

Samtykt á Løgtingi hin 8. desember 2020 við 28-0-0 atkvøðum.

formaður

/

/

skrivari

Konfererað við tað samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI, 8. desember 2020

stjóri

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

LM-046/2020